


www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 09 - 2011

# Trot á fólki í frálandavinnuni

Vónirnar um at finna fleiri nýggjar olju- og gassleiðir í danska partinum av Norðsjónum fara helst at útvega nógv nýggj arbeiðspláss innan frálandavinnuna í Esbjerg, sum er høvuðsfrálandabýur hjá dønum. Tann stóra avbjóðingin verður at fáa nóg mikið av fólki við teimum neyðugu førleikunum, tí meðan fleiri túsund danir ganga arbeiðsleysir, hava fleiri fyritøkur í frálandavinnuni í Esbjerg longu nú ilt við at fáa nóg mikið av arbeiðsmegi. Ein av Esbjerg-fyritøkunum, sum stríðist við hesar trupulleikarnar, er Semco Maritime. "Vit hava havt stóra framgongd á marknaðunum, men orsakað av vantandi orku hava vit verið noyddir at siga uppgávur frá okkum", sigur Steen Brødbæk, stjóri í Semco Maritime, við danska kringvarpið. Semco Maritime hevur høvuðssæti í Esbjerg, men felagið hevur deildir í fleiri londum.